| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 08. september 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 09/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 08. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 02. september 2011 um innkalling til fundar. Talan er um nýggjan fund, ið ásettur varð, eftir at almenni býráðsfundurin 26. august 2011 varð avlýstur.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Gudny Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard, sum boðað hevði borgarstjóranum frá tann 07. september 2011, at hann kom at hava forfall til fundin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 28/2011.**

**Skriv frá Kvinnulistanum um umboðan í mentamálanevndini og havnanevndini.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið skriv frá Kvinnulistanum, dagfest 31. august 2011 í sambandi við, at Kristina Toftegaard Larsen hevur fingið farloyvi frá býráðnum frá 01. august til 31. desember 2011 og varalimurin Gudny Vang hevur tikið sæti í farloyvistíðini.

Í hesum sambandi vil Kvinnulistin boða frá, at listi K ynskir, at Gudny Vang tekur sæti í mentamálanevndini og havannevndini, meðan Kristina er í farloyvi.

**Avgerð.**
Samtykt varð at taka undir við áheitanini frá lista K, soleiðis at Gudny Vang verður limur í mentamálanevndini og havnanevndini, meðan Kristina Toftegaard Larsen er í farloyvi. (9-0).

**Mál nr. 29/2011.**

**Umsókn frá Johns cafe um víðkan av skeinkiloyvinum umframt loyvi til uttandura skeinking til matstovuna.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Politinum í Føroyum, dagfest 05. juli 2011, hvar býráðið verður biðið um ummæli til umsókn frá SP/F HK Consulting, dagfest 28. apríl 2011 um víðkan av ½ skeinkiloyvi til 1/1 skeinkiloyvi, umframt uttandura skeinking til matstovuna Johns cafe á matr. nr. 689 í Fuglafirði.

Talan er um uttandura skeinking á terassuni vestureftir.

**Avgerð:**
Atkvøtt varð í tveimum. Fyrst varð atkvøtt um víðkan av skeinkiloyvinum frá ½ til 1/1 og varð samtykt at mæla Loyvisnevndini til, at veita Johns Cafe fult skeinkiloyvi sambært umsóknina. (6 atkvøður fyri og 3 blankar. Blankt atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen).
Síðan varð atkvøtt um uttandura skeinking á terassuni vestureftir. Samtykt varð at mæla Loyvisnevndini til, at loyvið verður givið. (3 atkvøður fyri, 1 atkvøða ímóti og 3 atkvøður blankar. Ímóti atkvøddi Petur Abrahamsen, meðan Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Gordon M. Petersen, Sonni á Horni, Magnus S. Midjord og Elisabeth D. Eldevig atkvøddu blankt).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D. Eldevig

Gudny Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen